Skrivligur fyrispurningur
eftir § 52a í Tingskipanini

Spyrjari: Høgni Hoydal, løgtingsmaður

Svarari: Bárður á Steig Nielsen, løgmaður

Evni: Avgerðirnar um, hvat hendir við landamørkini í Føroyum

Spurningar:

1. Hvør heldur løgmaður skal hava avgerðarrættin um, hvat fer fram við landamørkini í Føroyum, og hvørji krøv kunnu setast til tey, sum koma til Føroya – danskir myndugleikar ella føroyskir myndugleikar?

2. Ætlar løgmaður at gera nakað við málið?

Viðmerkingar:

Løgmaður og landsstýrismaðurin í heilsumálum hava seinastu vikurnar í sambandi við koronutiltøkini lagt dent á, at tað eru danskir myndugleikar, ið hava alla avgerð um, hvat fer fram við føroysku landamørkini.

Tjóðveldi hevur í fleiri førum lagt uppskot fyri tingið – eisini eftir koronu – um, at Løgtingið og Føroya fólk eiga sjálvi at gera av, hvat hendir við okkara landamørk, og hvørji krøv verða sett.

Kortini skilst á orðaskiftinum í fjølmiðlum og á sosialu miðlunum, at fleiri fólk eru bilsin um, at tað eru danskir myndugleikar, ið skulu gera hetta av.

Tí verður spurt um støðu løgmans, og um hann ætlar at gera nakað við málið.

Á Løgtingi, 15. november 2021

Høgni Hoydal